UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FOREIGN AFFAIRS, INDUSTRY AND TRADE

Tinganes, tann 30. apríl 2024
/uk

Fundi um ásetingar um nettrygd (klokkan 9:00, tann 29. apríl 2024 í Sethúsinum).

Luttakarar: Ulla Joensen og Tanja Lið frá Elektron. Jógvan Thomsen og Marner Jacobsen frá Fjarskiftiseftirlitinum. Svein Magnason og Unn Krákustein frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum.

Fundarfrásøgn
Í sambandi við uppskot um løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fjarskifti varð fundur hildin millum Elektron, Fjarskiftiseftirlitið og Uttanríkis- og vinnumálaráðið. Hetta var eftir áheitan frá Løgtingsins Vinnunevnd.

Á fundinum, sum varð 29. apríl 2024, vórðu ætlaðu broytingarnar í fjarskiftislógin viðgjørdar – saman við viðmerkingunum frá Elektron.

Elektron vísti á, at yvirskipað mettu tey ikki, at tað var skynsamt at seta áseting um kortlegging í gildi, uttan samstundis at seta í gildi skipanir um eftirlit og verju av tí einstaka.

Elektron vísti á, at sambært § 58 a, stk. 2, hevur Fjarskiftiseftirlitið víðar heimildir at savna upplýsingar, og harvið eisini atgongd at hyggja í skipanir o.a. hjá fyritøkum og myndugleikum.

> § 58 a. … *Stk. 2.* Fjarskiftiseftirlitið kann krevja allar upplýsingar útflýggjaðar, sum Fjarskiftiseftirlitið metir hava týdning fyri kortlegging sambært stk. 1.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið ásannaði, at tað ikki var nóg greitt út frá uppskotinum, hvørjar upplýsingar Fjarskiftiseftirlitið hevur heimild at savna. Víst varð á, at sum almennur myndugleiki kann Fjarskiftiseftirlitið ikki lógliga savna fleiri upplýsingar enn tær, sum lógin ásetir. Tá ið tað stendur, at Fjarskiftiseftirlitið kann krevja allar upplýsingar útflýggjaðar, sum Fjarskiftiseftirlitið metir hava týdning fyri kortlegging – so er heimildin avmarkað til kortlegging av undirstøðukervinum við tí endamáli at fremja nettrygd. Talan er sostatt ikki um heimild at savna annað og meir enn tað. Tað vildi verið ólógligt.

Í framløgu greiddi Fjarskiftiseftirlitið nærri frá, hvørji sløg av upplýsingum ætlandi verða savnað, og hvussu hetta ætlandi fer fram. Talan er um spurnablað, har myndugleikar og fyritøkur svara, og so verða svar tøppað inn í skipan hjá Fjarskiftiseftirlitinum. Farið verður sostatt ikki inn í skipanir ella annað hjá ymisku fyritøkunum og stovnunum. Tað er ikki ætlanin við kortleggingini.

Elektron vísti á, at tey taka undir við, at ásetingar um kortlegging (§ 58 a) verða settar í gildi.

Á fundinum varð sólsetursáseting umrødd. Elektron vísti á, at ein sólsetursáseting hevði havt við sær, at ein fyribils loysn ikki verður varandi. Uttanríkis- og vinnumálaráðið vísti á, at sólseturáseting er ein møguleiki.

Í § 2 ber til at áseta eitt stk. 2:

> § 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
> *Stk. 2.* § 58 a fer úr gildi 31. mai 2026.

Niðurstøðan á fundinum varð, at Uttanríkis- og vinnumálaráðið ger uppskot til frágreiðing frá fundinum, sum verður latin Elektron til viðmerkingar, áðrenn hon verður latin Vinnunevndini.